AGF hevur fingi› fer› á

Óli Johannesen tykist ikki sleppa upp í part í Århus, og í Hvidovre hava teir brúk fyri einum gó›um verjuspælara

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Óli Johannesen er ikki partur av AGF li›num, sum hesar seinastu vikurnar tríggjar fer›ir á ra› er fari› av vøllinum vi› fullum stigatali, eftir at teir hava spælt ímóti oddali›um.

Hesa fer› var AGF í Ikast, har teir vundu burturúr FCM, sum higartil hevur veri› millum fremstu li›ini. Óli Johannesen var ikki millum teir fyrstu ellivu, og hann var heldur ikki millum teir tríggjar AGF menninar, sum vór›u skiftir inn.

So at siga allan 1. hálvleik var heimali›i› vi› yvirlutan, men sí›stu lítlu løtuna undan ste›ginum fekk AGF tvey mál, og so vendi alt upp og ni›ur. Í 2. hálvleiki økti AGF til 3–0, á›renn FCM minka›i um munin, men úrsliti› gjørdist 4–1 til AGF.

Merkisvert var ta›, at ein av FCM monnunum, Søren Skriver, var so óheppin, at hann tvær fer›ir gjørdi sjálvmál. Hann hjálpti AGF at skora til 2–0 og til 4–1.

Solti› hjá Hvidovre

Á n‡ggjárinum skal Óli Johannesen í n‡tt starv. Hann flytir úr Århus og AGF og til Keypmannahavnar og Hvidovre í 1. deild.

Stø›an hjá fyrrverandi TB venjaranum, Frank Skytte, og Hvidovre er ikki meiri enn passalig. Í vikuskiftinum var 15. og seinasta umfari› undan vetrarste›ginum í 1. deild á

Teir í Arhus hava rættiliga fingi› naka› at fegnast um, men Óli Johannesen er als ikki partur av frøini

skránni. Hvidovre var í grannalagnum og spældi. Mótstø›uli›i› í Valby var gamla arbei›arafelagi› Frem. Heimali›i› vann 2–0, og harvi› eru teir á odda í næstbestu deildini. 16. umfari› av teimum í alt 30 í næstbestu deildini ver›ur á skránni 17. mars.

Hvidovre er á 11. plássi. Fyrsti landskappingardysturin hjá teimum, eftir at Óli Johannesen ver›ur komin til felagi›, ver›ur 17. mars. Tá skulu teir spæla á heimavølli ímóti Birkerød, sum er á ni›urflytingarplássi.

Brøndby á odda

Í superliguni er Brøndby framvegis á odda. Sunnudagin treiska›ust næstan fimtan túsund ásko›arar, tá teir møttu upp á Brøndby stadion, har botnproppurin úr Haderslev vitja›i. Brøndby vann 4–2, men ta› gekk ikki so lættliga fyri seg, sum tey flestu mundu hava rokna› vi›. Haderslev kom á odda 1–0, og venjarin hjá teimum var so misnøgdur, tá ta› var li›ugt, og teir høvdu tapt, at hann ákærdi mest kenda dómaran, Kim Milton Nielsen, sum ver›ur rokna›ur at vera fremsti dómarin í Danmark, at hava veri› heimadómari, so ta› stó› eftir í. Haderslev venjarin vildi vera vi›, at Brøndby hev›i ikki havt vunni›, um teir ikki høvdu havt fingi› hjálp frá dómaranum.

Ta›, sum venjarin sipa›i til, var, at málverjin hjá Haderslev, Jesper Mortensen, fekk rey›a korti›, tí dómarin metti, at hann hev›i vart vi› hondini uttanfyri brotsteigin. Sjónvarpsupptøkur sta›festu, at bólturin hev›i rakt í høvdi› á málverjanum. Ru›uleiki stó›s av stø›uni, og í tí sambandinum fekk Søren Colding hjá Brøndby rey›a korti› fyri at skumpa.

Dropin, sum fekk bikari› hjá venjaranum at flóta yvir, var, at hann ikki kolldømdi eitt av málunum hjá Brøndby fyri rangstø›u. Upptøkurnar vístu, at ta› var rangstø›a.

Í Gladsaxe spældu AB og AaB 1–1. Í gjárkvøldi› skuldi OB vitja í Silkeborg.

Tíggjundu fer›ina gekk ta› ikki

Todi Jónsson sá gult, tá ta› enn eina fer › var› sta›fest, at ta› hilnast illa, tá FCK spælir í Jyllandi

SUPERLIGA
Jóannes Hansen

Tá FCK sunnudagin fór á vøllin í Viborg, høvdu Todi Jónsson og teir ikki tapt í níggju dystum á ra›. Í tíggjundi royndini eydna›ist ta› ikki at vinna. Ta › kunnu teir í FCK fyrst og fremst takka sær sjálvum fyri. FCK hev›i bóltin nógv, og teir høvdu fleiri upplagdar møguleikar, men teir fingu ikki mál fyrrenn ta› bara resta›u níggju minuttir. Málskjútti var li›forma›urin og mi›verjin Jacob Laursen, sum úr 22 metrum sendi flatt fríspark framvi› manngar›inum og í kassan.

Pascal Simpson, Christian Lønstrup og eisini Todi Jónsson høvdu møguleikar at gera fleiri FCK mál, men ta› var› ikki meiri enn nær vi› og næstan. Todi Jónsson spældi allar 90 minuttirnar, og hann taldist millum teir mest sjónsku hjá FCK. Fer› eftir fer› megna›i hann at snei›a seg til baklinjuna í vinstru og leggja innfyri, men teir inni undir málinum vóru als ikki sannførandi.

FCK venjarin, Roy Hodgson ásanna›i, at hansara li› hev›i ein trupulleika:

– Vit spældu okkum til eina rø› av møguleikum, og sum dysturin mynda›ist, so haldi eg ikki, at vit høvdu uppibori› at tapa, men vit fáa ov líti› burtur úr málmøguleikunum. Ta › hava vit sæ› fleiri fer›ir, og ta› sóu vit aftur í dag, seg›i Roy Hodgson.

Ta› leika›i nógv á, og gula korti› var ofta á lofti. Fyri fyrstu fer› í hesum kappingarárinum var Todi

Rune Pedersen noyddist hesa fer› at ásanna, at hann noyddist oftari inn í meskarnar enn starvsfelagin hinumegin

Jónsson millum teirra, sum sá gult. Ta› gjørdi hann fyri ógvusliga takling á mi›jum vølli, tá 34 minuttir vóru farnir.

Tá Todi fekk gula korti›, var Viborg longu frammanfyri 2–0. Fyrra máli› fingu teir í 4. minutti. Ta › var› stúta› eftir innlegg. Seinna máli› fingu teir í 26. minutti. Heine Fernandez fekk ta› eftir innlegg úr høgru.

Hjá FCK kom til illa vi›, at mi›vallarovastin, Ståle Solbakken, longu undan ste›ginum noyddist at taka seg burturúr, tí hann var skaddur í beininum

Stórdystur

Komandi sunnudag fær FCK vitjan av Silkeborg. Men longu í anna› kvøld ver›ur FCK annar parturin í einum stórum drama. Lutakasti› í steypakappinginini hevur laga› ta› solei›is, at li›ini, sum mong droyma um skuldu dystast í finaluni kristi himmalsfer›ardag, hittast í anna›kvøld. Á Brøndby stadion ver›ur avgjørt, um ta› ver›ur Brøndby ella FCK, sum skal halda fram í steypakappingini. Eingin ivi er um, at Todi Jónsson ver›ur ein av teimum fyrstu ellivu hjá FCK.

Viborg skal spæla aftur hósdagin. Tá skulu teir spæla í UEFA Cup. Teir taptu 1–0 í fyrra dystinum í Spania, og tí ver›ur ta› mett ikki at vera líti› sannlíkt, at danska li›i› fer at megna at strí›a seg ví›ari í kappingini. Fyrsta treytin er, at gestirnir ikki sleppa at skora mál, og at Viborg í hvussu so er skorar eina fer›. Ver›ur talan um longda leiktí› ber til at ímynda sær allar møguleikar.

Stø›an, danska superligan

		dystir	v	-	j	-	t	vunnin mál	tapt mál	málmunur	stig
1	Brøndby	15	9	-	2	-	4	41	19	22	29
2	Lyngby	15	9	-	1	-	5	27	26	1	28
3	FC Midtjylland	15	7	-	5	-	3	25	19	6	26
4	FCK	15	7	-	4	-	4	22	12	10	25
5	Silkeborg	14	6	-	7	-	1	20	18	2	25
6	Viborg	15	6	-	4	-	5	20	13	7	22
7	OB	14	6	-	2	-	6	22	15	7	20
8	AaB	15	5	-	4	-	6	24	26	-2	19
9	AGF	15	6	-	1	-	8	23	29	-6	19
10	AB	15	3	-	6	-	6	20	23	-3	15
11	Herfølge	15	3	-	4	-	8	19	32	-13	13
12	Haderslev	15	0	-	4	-	11	14	45	-31	4

Føroyar vunnu stórt í 8. umfari

Føroysku telvarnir framdu megnarhál í áttinda umfari í OL í Istanbul. Teir vunnu sunnudagin heili 3,5-0,5 ímóti Trinidad & Tobago og John Arni Nilssen vann sítt fyrsta talv

TALVOLYMPIADA:
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Undan dystinum ímóti Trinidad & Tobago leiktu Føroyar í sjeynda umfari ímóti Belgia, sum var styrkismett væl hægri enn Føroyar. Dysturin enda›i vi› einum 2,5-1,5 sigri til Belgia, sum ta› var eitt gott úrslit hjá føroyingum. John Arni, John Rødgaard og Heini Olsen leiktu javnleik, me›an Flóvin tapti á fjór›a bor›i. Frá føroyingunum frættist at hesin dystur saktans kundi enda javnur 2-2, men at teir tó kortini vóru nøgdir vi› úrsliti›.

Eftir eina ringa byrjan, vísti John Arni hansara dygdir á fyrsta bor›i. Rødgaard megna›u uttan stórvegis hóvasták javnleik vi› svørtum og Heini leikti somulei›is ein skjótan javnleik. Flóvin telva›i væl, men tapti heldur óney›ugt.

Rødgaard heldur áfram vi› stórspæli

Trinidada & Tobagomenn eru veikari enn føroyingarnir, og ta› prógva›u okkara menn eisini vi› knúsandi stórsigrinum.

John Arni sum umbo›ar Føroyar á fyrsta bor›i, vann umsí›ir sítt fyrsta talv. Hetta var› í áttinda umfari. Hann lokka›i mótstø›umann sín í eina byrjanarfellu, og vann sær b‡tismun, og vónandi gevur sigurin honum sjálvsálit sum er alney›ugt á fyrsta bor›i á talvolympiadu. Talvi› hjá John Arna er vi› í bla›num í dag.

John Rødgaard, okkara einasti altjó›a meistari, er ikki til at ste›ga í løtuni. Hann vann ruddiliga sítt talv sunnudagin, og hevur nú ogna› sær heili fimm stig av sjey møguligum á ørum bor›i.

Vit mistu hálvt stig ímóti Trinidad & Tobago, men Heini skal vera gla›ur fyri sín javnleik á tri›ja bor›i. Hann misti mann fyri tvær finnir, men fekk sn‡tt mótstø›umannin í endatalvinum og hála›i javnleikin heim. Heini hevur ikki enn víst síni ey›kendu talvevnir, men kenna vit Heina rætt gevst hann ikki so.

Flóvin vann í ey›kendum stíli á fjór›a bor›i. Hann vann sær eina finnu, og fekk sí›ani b‡tt nærum alt fólki› av bor›inum og vann trygt og klárt í endatalvinum.

Eitt gott úrslit, sum gevur føroyingum 16,5 stig eftir átta umfør. Sostatt hevur li›i› beint yvir 50%. Seks umfør eru eftir av talvolympiaduni.

T‡skland er á odda vi› 23,5 stigum, me›an favorittarnir úr Russlandi liggja beint í hølunum. Danir hava eitt sterkt li› vi› fimm stórmeistarum og einum altjó›a meistara, og teir liggja eisini væl fyri vi› 19,5 stigum.

Einstøku úrslitini

John Arni	2,5 / 7
Rødgaard	5 / 7
Heini	3 / 7
Flóvin	3,5 / 7
Ólavu	2 / 3
Ey›un	0,5 / 1

Sum ta› sæst so hava f‡ra teir fremstu telva› nærum øll talvini. Ólavur hevur veri› sjúkur, men er nú frískur og væntandi sleppur hann at royna seg aftur.

Ey›un er sætti ma›ur, men telvar bert um brúk er fyri honum. Ta› vil siga um sjúka ávirkar li›i›, ella um menn eru troyttir og vilja hava frí. Fjúrtan umfør skulu leikast og ta› er sera krevjandi fyri telvarnar.

Cave,C (2296) — John Arni Nilssen (2354)
34th Chess Olympiad (men) Istanbul (8), 05.11.2000

1.e4 c5 2.Nf3 Nc6 3.d4 cxd4 4.Nxd4 e5 5.Nb5 d6 6.N1c3 a6 7.Na3 b5 8.Nd5 Nge7 9.c3 Nxd5 10.Qxd5 Bb7 11.Nc2 Nd4 12.Qxb7 Nxc2+ 13.Kd1 Nxa1 14.Qc6+ Ke7 15.Qb7+ Kf6 16.h4 Be7 17.Rh3 Ke6 18.Rd3 f6 19.g3 Kf7 20.Qd5+ Kf8 21.Bh3 Rb8 22.Bf5 Qc7 23.Be3 Qc4 24.Kc1 Qxd5 25.exd5 Bd8 26.Bd2 Bb6 27.Rf3 Ke7 28.Kb1 a5 29.Kxa1 Bc5 30.g4 g6 31.Be6 h5 32.g5 f5 33.Kb1 b4 34.Be1 Rb7 35.Kc2 Rhb8 36.Kc1 b3 37.a4 Rc7 38.Rd3 Bb6 39.c4 Rxc4+ 40.Kb1 Bd4 41.Bxa5 Rxa4 42.Bc3 Rba8 43.Kc1 Rc4 44.Kb1 Bxc3 0-1

HM dystur

Vladimir Kramnik n‡ggjur heimsmeistari

Næstseinasta talvi› í HM dystinum enda›i vi› javnleiki sum vi›førdi at Vladimir Kramnik bleiv heimsmeistari. Kasparov var tætt vi › at vinna hetta næstseinasta talvi›, men enn einafer › vísti Kramnik sínar verjudygdir.

TALV
Carl Eli Nolsøe Samuelsen

Ein n‡ggj tí› í talvi er komin, ta› er heilt vist. Seinastu fimtan árini hevur Gary Kasparov mynda› ovasta toppin, men hósdagin skriva›i Vladimir Kramnik seg í talvsøguna vi› at yvirtaka heimsmeistaraheiti› frá landsmanni sínum Kasparov í dysti teirra millum í London.

Kasparov vil fegin hava n‡ggjan dyst

Kasparov var ma›urin sum vildi hava Kramnik sum avbjó›ara til HM-heiti› hansara, tí hann metti Kramnik vera sterkasta mótstø›umann, og rætt hev›i Kasparov. Kasparov seg›i eftir næstseinasta- og avgerandi talvi›, at hann var ov illa fyrireika›ur til allan HM dystin sum heild. Hann helt uttan iva at hann hev›i møguleikar í hesum talvdysti, men seg›i somulei›is at Kramnik telva›i væl og var› rætti vinnarin. Spurdur bleiv Kasparov um hansara tí› er farin sum topptelvari, og svari› var› klárt: Nei! Hann seg›i seg bert bí›a eftir næsta tilbo›num at telva n‡ggjan HM dyst, og at hann altí› er klárur til n‡ggjar avbjó›ingar nú hann ikki kann kalla seg heimsmeistara.

Kasparov er 37 ára gamal, men í talvi er ta› als eingin aldur. Til dømis er ví›agitni telvarin Victor Kortschnoj 69 ár, og enn er hann aktivur og hevur eitt ratingtal á umlei› 2630. Kasparov er í besta aldri og kann uttan iva koma sterkt aftur, eins og fyrimynd hansara Alexander Aljekhin gjørdi tá hann í 30´unum misti HM heiti› ímóti Max Euwe, og sí›ani nøkur ár seinni endurvann heiti› júst ímóti Euwe.

Kramnik tilrei›ar at vinna telduna

Tá Kasparov bjó›a›i Kramnik javnleik í fimtanda og næstseinasta talvinum var Kramnik skjótur at takka fyri, og sí›ani at hevja sigursgla›ur armarnar upp í luftina. Hetta var› ein barndómsdreymur sum heilt klárt l‡stu úr kropsmáli› hansara. Hann vann sera uppibori› talvdystin ímóti ungdómslærara sínum, og hvat er nú meira hjá honum at vinna? Jú, talvtelduna. Júst spurningin um hvat hann helt um ein møguligan talvdyst ímóti einari n‡ggjari útgávu av talvtelduni Deep Blue, seg›i Kramnik seg vera tilrei›ar til ein slíkan dyst. Og vónandi megnar Kramnik at vinna ímóti talvbeistinum, sum roknar eini fimm milliónir møguleikar um sekundi.

Kasparov er nú koppa›ur av alheims talvkrúnuni, og so er spurningurin, um Kramnik megnar at halda fast um n‡vunna fyrsta plássi›



Hetta ver›ur sjálvsagt ein n‡ggj tí› hjá Kramnik framyvir, men hann fer uttan iva at megna uppgávuna sum heimsmeistari væl. Hann er róligur og kaldur av lyndi, og júst hesir eginleikar vór›u orsøkir til HM heiti› hansara.

Sekstan talv átti at telvast telvast í HM dystinum, men í sta›in fyri at telva seinasta talvi› sum er uttan ávirkan á samla›a stø›una, so var› telva› styttri talv. Seinasti talvdagurin í HM dystinum bleiv sostatt ein showdagur vi› stórum tí›indafundi o.ø.

Avgerandi HM talvi ›

Kasparov,G (2830) - Kramnik,V (2751)
BGN World Chess Championship (15), 02.11.2000

1.d4 Nf6 2.c4 e6 3.g3 d5 4.Bg2 Be7 5.Nf3 0-0 6.0-0 dxc4 7.Qc2 a6 8.Qxc4 b5 9.Qc2 Bb7 10.Bd2 Be4 11.Qc1 Bb7 12.Bf4 Bd6 13.Nbd2 Nbd7 14.Nb3 Bd5 15.Rd1 Qe7 16.Ne5 Bxg2 17.Kxg2 Nd5 18.Nc6 Nxf4+ 19.Qxf4 Qe8 20.Qf3 e5 21.dxe5 Nxe5 22.Nxe5 Qxe5 23.Rd2 Rae8 24.e3 Re6 25.Rad1 Rf6 26.Qd5 Qe8 27.Rc1 g6 28.Rdc2 h5 29.Nd2 Rf5 30.Qe4 c5 31.Qxe8 Rxe8 32.e4 Rfe5 33.f4 R5e6 34.e5 Be7 35.b3 f6 36.Nf3 fxe5 37.Nxe5 Rd8 38.h4 Rd5 Javnt og Kramnik heimsmeistari